## Ein sterkur høvuðsstaður 2:

# Tá visión 2015 bleiv til bygdarmenning

ANNIKA OLSEN
Býráðslimur í Tórshavn



**Um vit skulu røkka visión 2015, so má Tórshavn gera seg til reiðar at húsa í minsta lagi 50.000 fólkum, og ikki sum higartil, har man nærum hevur gjørt alt fyri at demotivera føroyingar og aðrar góðar kreftir at flyta hendanvegin. Vit skulu gera tað lokkandi og áhugavert hjá dugnaligum fólkum við framtíðar førleikum, vitan, eins og vit skulu draga at okkum vinnuligt virksemi og kapital til Føroyar – og hvat er meiri náturligt enn at hesi ynskja at búseta seg í Havnini! Um vit skulu standa okkum á altjóða pallinum er tað ein treyt at hava ein sterkan og áhugaverdan høvuðsstað.**

Tað frøddi meg fyrstu ferð, eg hoyrdi um visión 2015, tí tað var eitt frambrot innan føroyskan politikk, sum í alt ov stóran mun hevði verið ov stuttskygdur, har visiónirnar sjálvdan rukku longur enn eitt samgonguskeið. Í tí visiónsarbeiði, sum higartil er gjørt, er nógv frálíkt komið burturúr hjá teimum ymisku visiónsbólkunum um, hvussu vit skulu mynda okkara samfelag tey næstu árini fyri at røkka á mál. Men visión 2015 kann ongantíð røkkast, so leingi sum lokalpolitikkur spælir so stóran leiklut í føroyskum politikki. Onki kjak hevur verið í Løgtinginum og ei heldur nøkur politisk avgerð tikin, uttan at málsviðgerðin er vorðin ein vavstur av lokalpolitiskum áhugamálum. Málini, sum hava fingið politiska viðgerð, eru ikki at kenna aftur frá sínum uppruna líki. Avgerðirnar, niðurstøðurnar og loysnirnar eru vavdar upp í ein ellubita orsaka av, at hvør einstakur fólkavaldur hevur tryggja sær síni bygd og sítt valdømi umboðað á besta hátt í avgerðini – og man hevur loyvt hesi gongdini. Bygdarmenning og útjaðarapolitikkur er tann heilaga kúgvin í føroyskum politikki.

Kjakið um Havnina mótvegis bygdunum er álvarsliga kyknað í seinastuni í kjalarvørrinum á flytanini av Strandferðsluni út úr høvuðsstaðnum, og somuleiðis er við áheitanini frá teimum 13 tingfólkunum um at seta skjóttarbeiðandi nevnd, sum skal kanna hvørji almenn størv kunnu flytast úr Havnini. Ein tílík gongd at flyta allar almennar stovnar og størv út úr høvuðsstaðnum og harvið spjaða vitan, royndir og førleikar runt um allar Føroyar, stendur í beinleiðis andsøgn við visión 2015. Vit eiga at hyggja út um landoddarnar og ikki hugsa so nógv um nærmasta bygdarmark, sum núsitandi útjaðarasamgonga í alt ov stóran mun ger. Um vit skulu standa okkum á altjóða pallinum, er tað ein treyt at hava ein sterkan og spennandi høvðusstað, sum kann vera lokkandi fyri teir umleið 20.000 føroyingarnar, ið eru búsitandi í eitt nú Danmark, umframt onnur, sum á ein og ella annan hátt kunnu verða við til at styrkja og brynja okkara samfelag til framtíðar avbjóðingar.

Í einari kanning, sum bleiv gjørd í fjør gekk tað fram, at tað vóru millum annað 89 føroyskir læknar og 56 løgfrøðingar, sum vóru búsitandi í Danmark. Eg vænti neyvan, at vit fáa hesar føroyingar við teirra virðismiklu altjóða royndum og vitan at flyta heimaftur til Føroyar við at tøma høvðusstaðin fyri avbjóðandi arbeiðspláss og spjaða tey vælútbúnu og royndu starvsfólkini út um alt landið. Tað eru júst hesi somu fólk, sum hava ynski um eitt sterkt fakligt umhvørvið, alternativ tilboð innan frítíðarlív og mentan.

Tað sum hendir í løtuni eru panikkloysnir, nú tað stundar móti vali og politikkararnir skulu til at kjúkla um teirra valdømi.

**Visiónin er at menna Havnina til vøkstur**

Rákið í dag er, at fólk búseta seg í størri býum. Fólk ynskja at vera har, onnur fólk eru, har tey kunnu fáa fakligan íblástur í arbeiðinum, hava eitt sterkt fakligt umhvørvi umframt at hava eitt ríkt mentanarlív og nógv tilboð at velja ímillum í frítíðini. Tað er ikki longur nokk bert at hava eitt arbeiði og fáa mat í munnin. Í dag seta fólk onnur krøv, tí tað skal vera spennandi, mennandi og áhugavert at vera, har tey búseta seg. Tað er ein orsøk til, at fólk búseta seg í Havn, her er størsti møguleiki fyri at fáa eitt fakligt avbjóðandi starv, her er eitt ríkt mentanarlív, her er atmosfera og her er lív. Føroyingar, ið hava nomið sær útbúgving uttanlands leita sær aftur til Tórshavn, tí Tórshavn í størstan mun gevur teimum tað, tey eru von við frá teimum stórbýum, tey hava búleikast í í lestrartíðini. Søguliga hevur tað víst seg, at tá ið politikarar byrja at dirigera, hvar fólkið skal búgva, tá máar man støði undan sær sjálvum.

Vit eiga at seta okkum sum mál, at Tórshavn skal mennast, so høvuðsstaðurin hevur rúm fyri 50.000 fólkum at búgva í í 2015, og ikki sum nú, har man nærum mótarbeiðir, at fleiri skulu búgva í Tórshavn. Tað er ikki rætt at flyta fólk móti teirra vilja. Fólk vilja búgva í Havnini, og vit eiga tískil heldur at skapa góðar karmar fyri hesar íbúgvar.

**Høvuðsstaðurin er lokomotivið hjá Føroyum í alheimsgerðini**

Vit býráðspolitikarar eiga at tryggja okkum, at fleiri bústaðarmøguleikar eru til taks. Vit eiga at útstykkja grundstykkir og bjóða fram aðrar bústaðarmøguleikar til hesa fólkaøkingina. Vit eiga eisini at hugsa um at skapa nógv betri og øðrvísi karmar fyri barnaansning, so barnafamiljurnar kunnu gerast ein meiri fleksibul arbeiðsorka – bæði í vinnulívi og í politikki. Vit skulu skapa karmar fyri, at frítíðarlívið kann mennast – so frítíðarlívið gerst áhugavert hjá tí privatu vinnuni at gera íløgur í. Vit eiga at skapa betri karmar fyri tænastu- og ferðavinnuna, so vit kunnu menna okkum sum ferðaland við góðum tilboðum til gagns fyri bæði ferðafólk og tey fastbúgvandi. Mentanarlívið skal áhaldandi stimbrast, betra um útbúgvingarmøguleikar, møguleikar fyri gransking og íverksetan, sum kann skapa áhugaverd arbeiðspláss. Býarlívið skal gerast ríkari, miðbýurin skal gerast fjálgur og hugnaligur, har fólk trívast og koma saman. Tórshavn, sum høvuðsstaður skal verða ráðstevnu-, granskingar- og íverksetanarbýur burturav, sum kann fáa fyritøkur uttanlands við vitan og kapitali at leita sær hendan vegin. Hetta síðsta krevur tó, at gistingarmøguleikarnir gerast betri.

Kanónin skal vendast. Vit skulu ikki hugsa so nógv um Tórshavn mótvegis bygdunum, men heldur Tórshavn mótvegis alheiminum, tað er hendan vegin vit skulu ganga, um vit skulu røkka visión 2015. Eitthvørt land, ið vil framburð má hava eitt lokomotiv, og tað er høvuðsstaðurin.

# Svínoyggin

BJARNI JACOBSEN



Aftan á at eysturoyartingmaðurin Torbjørn Jacobsen so hegnisliga legði eina ætlan fram á løgting um at menna Svínoynna við einum tunli og einari atløgubryggju yviri í Havn; ein ætlan sum Svínoyar kommuna hevur søkt um síðan 1982, uttan svar, regnaðu negativar meiningar niður yvir prosjektið. At norðoyatingmaðurin Jógvan við Keldu ikki skammast við sínum lunkutu, óvitandi úttalilsum, skilji eg ikki. Tú gjørdi okkum eina tænastu at tagt. Og hinir norðoyingatinglimirnir sum ikki tóku orðið, liggja ivaleyst á sama støði. Til seinast í orðaskiftinum varð alt jarðað av Bjarna Djurholm, stuðlaður frá Landsverk.

Verkfrøðingarnir á Landsverk munnu halda seg vera klókari enn nøll onnur menniskju á klótuni. Ella eru teir tað? Mær vitandi blómar øll faklig vitan út frá at brúka oyru og eygu við sambandið við skilamenn. Og við einum sovorðnum prosjektið sum hesum liggur sjálvandi besta vitanin á staðnum. Og eingin í Svínoynni sigur seg vera spurdan um nakað sum helst.

Hanus Olsen, verkfrøðingur, ættaður úr Svínoy, gjørdi eitt prosjekt fyri 5 árum síðani fyri kommununa. Tunnil og atløgubryggjan kostaðu 27,5 mill. Atløgubryggjan er á norðara endanum á havnini. Á norðara endanum er lítið rák á eystfallinum, men kemur ein suður um havnina á tað grunna, »Havsbøll«, er nógv rák. Á vestfallinum er lítið rák inni við land, men tað er norðari endin, ið vit skulu brúka, sum Hanus teknaði.

Sambært Bjarna Djurholm hevur Landsverk kannað umstøðurnar í 3 ár. Hví hava teir ongantíð tosað við okkum, sum eru barnfødd á staðnum? Hava búð har í mannaminnir, hav sitið oman fyri havnina og fleygað lundar og eygleitt rákið frá Urarók og suður um havnina? Vit kundu sagt teimum alt.. Ikki upp á 3 ár, men 3 tímar.

Villa prosjektið, sum Landsverk hevur uppskot um við Eiði í Svínoynni, sigur okkum hvussu lítið teir kenna til lokalitetin. Ber tað til at gera eina havn har, skal brimgarðurin vera minst 30 metrar høgur. Eiði er eitt tað ringsta brimpláss í Føroyum. Brimættirnar eru frá vestan upp í norðan og niður í eystan. Tað er jú hálvur sólargangur. Bert lágættirnar og upp ímóti vestri kunnu brúkast við eiði.

Tað fættist einaferð, at Landsverk hevði sett eina streymboyu niður við Havnina. Eg spyrji hvar? Tað kann ikki gera tað sama, hvar ið boyan stendur. Eystfallið rekur nevniliga dupult so hart sunnan fyri Havnina sum norðanfyri. Eg havi sitið oman fyri Havnina og eygleitt lundar og annan fugl á sjónum frá Urarók, einar 500 m norðan fyri havnina, eitt pláss sum var nógv siglt upp á um vetrarnar við Imanuel, tá ið brim var allastaðni. Fuglurin á sjónum rekur ikki skjótari við norðara enda á havnini enn við Urarók. Á Urarók havi eg lent hundraðstalsferðir við árabáti, uttan at tað hevur verið neyðugt at tikið tað fyrilit til streym. Eg trúgvi at rákið norðan fyri havnina, inni við land, er nakað sum við Oyragjógv.

Meðan Bjarni Djurholm hevur sitið sum landsstýrismaður, er bara gingið eftir reyv við Svínoynni. Bara skuffilsir aftaná skuffilsir. Menniskjað støðast sum kunnugt ikki uttan vón. Hann hevur so ofta havt á orði, at politikararnir skulu seta rammur, meðan initiativið skal koma av staðnum. Tað nyttar einki at seta nakrar rammur, sum ikki kunnu brúkast og ei minni at kroysta nakað út yvir nøkur menniskju, sum ikki vilja hava tað. Her má kollveltandi broyting koma í. Vit hava bert eitt ynski og tað er tunnil við atløgubryggju. Hetta er ein lítil íløga fyri landið. Eg sígginógvar møguleikar í Svínoynni og Føroyar verða eitt nógv ríkari land. Vit hava bara ikki ráð til at lata Svínoynna eisini fara fyri skutil. hetta er eingin prioriteringsspurningur.

Sum støðan er nú, seta vit okkara vón til at Tjóðveldisflokkurin kemur fram at aftur at stýra landinum og at Tórbjørn Jacobsen verður vinnumálaráðharri. Setið so beinanvegin 50 mill. av til Svínoynna. Bið Hanus Olsen standa fyri prosjektinum, sum hann sjálvur hevur gjørt. So eri eg vísur í, at hann klárar at keypa okkum eina ferju fyri peningin, sum leypur av. Útoyggjamenn bera ikki orð fyri at oyðsla við peningi.

Tá ið vit hoyra Bjarna Djurholm varpa út av tingsins røðarapalli um allar milliardirnar, ið brúkast skulu at gera tunlar og vegir, bara fyri at koma nakrar minuttir fyrr til Tórshavnar, so ivist eg í um vit liva í sama landi.

Svínoyggin kemur at mennast aftur, tá ið tey røttu fólkini koma fram at stýrinum í hesum landi. Fólk, sum handla, vilja og føla nakað fyri oynni. Harmiligt er at teir, sum ahva fingið okkara atkvøður øll hesi ár, hava misrøkt okkara álit á teir so dyggiliga, at eg kann ikki trúgva, at nakar svínoyingur velur teir aftur.

Svínoy 25. mars 2007

